UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

MINISTRY OF ENVIRONMENT, INDUSTRY AND TRADE



# Landbúnaðarpolitikkur

# Endamál

At gerast meira sjálvbjargin við burðardyggum, stuttfluttum, heilsugóðum, staðbundnum landbúnaðarvørum, har vit:

- verja vistfrøðiliga grundarlagið og bestu landbúnaðarjørðina,
- tryggja kappingarføri og betri lønsemi,
- skapa vinnumøguleikar og arbeiðspláss kring landið í landbúnaði,
- menna vitan, útbúgving, gransking og royndir,
- økja um tilvitskuna, marknaðarføringina og virðingina fyri føroyskum landbúnaðarvørum.

# Høvuðstættir

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF ENVIRONMENT, INDUSTRY AND TRADE

1. Betri lønsemi
2. Økt matvøruframleiðsla
3. Burðardygd
4. Vitan, útbúgving og gransking

# Betri lønsemi

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

MINISTRY OF ENVIRONMENT, INDUSTRY AND TRADE

- Gera løgtingslóg um landbúnaðarframleiðslu
- Stuðulsskipanir í eina lóg við somu stuðulsmøguleikum (harundir grønmeti o.a)
- MVG frítøka
- Markamótini millum BST og BG verður greitt
- Løgtingslóg um Búnaðargrunn verður dagførd.
- Løgtingslóg um landsjørð verður dagførd, m.a. í mun til festaraskifti og festitreytir, Brúks- og/ella framleiðsluskylda fyri festi og traðir

- Fíggjarligu karmarnir, undir hesum serliga lánstreytir og -viðurskifti, verða eftirmettir og dagførdir. Festikonta. Broyta persónliga heftið hjá festibóndum.
- Íløgustuðul til vakstrarhús, lendisbúning, landbúnaðarferðavinnu o.a.
- Ullarmóttøka og stuðul
- Skipað hagtalsarbeiði og dagførd hagtøl
- Møguleikar at skipa felags maskinstøð

# Økt matvøruframleiðsla

## Grønmeti

- Vinnulig grønmetisframleiðsla javnsetast við aðra landbúnaðarframleiðslu.
- Hóskandi karmar, sum leggja upp fyri stóru óvissuni í grønmetisframleiðslu (trygdargrunn)
- Íløgustuðul til vakstrarhús, lendisbúning o.a.
- Búnaðarstovan raðfestir royndir við grønmetisframleiðslu – Sandoy
- Leiga smærri jarðarteigar til ikki-vinnuliga grønmetisframleiðslu

- Brúks- og/ella framleiðsluskylda fyri festi og traðir
- Felags gartnari
- Undirvísing í grønmetisdyrking
- Almennir køkar brúka føroyskar rávøru
- Skúlar, stovnar saman við bóndum og framleiðarum virka rávørur

# Økt matvøruframleiðsla

## Mjólk

Stuðulin til mjólkarframleiðslu umskipaður soleiðis, at stuðul eisini kann verða latin til íløgur í framleiðsluútgerð, bæði á mjólkarvirkjum og hjá framleiðarum í fyrsta liði.

## Kjøt

- Stuðulsskipanin verður broytt soleiðis, at munadyggur stuðul fæst til at gøða kálvar til slakt.
- Farið verður undir miðvísa skráseting av kríatúrum, so stuðulin verður avmarkaður til húsdýr, sum eru skrásett.
- Annar fenaður

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF ENVIRONMENT, INDUSTRY AND TRADE

# Økt matvøruframleiðsla

## Søla og distribusjón

- Skipa distribusjón sum fær vøruna tættari kundanum
- Menna tilvitið um føroyskar vørur – keyp føroyskt

## Sláturvirki

- Løggild sláturvirki verða skipað

# Økt matvøruframleiðsla



## Stráfóður

- Stuðul til stráfóður verður broyttur soleiðis, at stuðul verður latin stigvíst eftir góðsku og fyri framleiddar fóðureindir heldur enn fyri tali av djórum.
- Stuðul verður eisini latin teimum, sum einans framleiða stráfóður at selja øðrum.
- Stuðul verður latin at umleggja gamlan bø til maskinbø.
- Búnaðarstovan, bøndur og aðrir viðkomandi partar, fara undir miðvísar royndir við at velta stráfóður, sum síðani verður turkað til hoyggj, og at gera royndir við øðrum vøkstri, sum kann brúkast til fóður, t.d. bygg, havra, fóðurrøtur , fóðurkál o.a.



# Burðardygd

- Verja bestu landbúnaðarjørðina – lógarbroyting nú
- GIS-grundaða talgilda landsjarðarskipan (TLS) setast í verk
- Taðingaratlas – og kunngerð um taðing
- Stuðul til seyðahús at hava seyðin inni longri part av árinum
- Stuðul til "kulturbeiti" (minka trýstið á vetrarhagan)
- Djóravælferð

# Vitan, útbúgving og gransking

- Skipa (nýggja) útbúgving í landbúnaði, sum eisini gevur atgongd til útbúgving uttanlands.
- Betra stuðulsmøguleikar hjá teimum, ið leita sær uttanlands at nema sær útbúgving innan landbúnað.
- Samskipa útbúgvingarmøguleikar innan matvøruhandfaring av ymsum slagi og somuleiðis innan landbúnaðarferðavinnu.

- Gera greining av undirstøðukervinum fyri matvøruútbúgvingum, gransking og menning (GAP/gjáar-greining – er liðug í næstum).
- Nøktandi orka verður tøk til royndar- og granskingarvirksemi, eins og Búnaðarstovan skal veita hóskandi ráðgeving um førleikamenning í øllum liðum í framleiðsluni.
- Skipa fyri førleikamenning, t.d. við viðkomandi skeiðum.
- Fróðskaparsetrið – Granskingargrunnurin (Burðardygd, vistfrøði, heilsufrøði v.m.)

# Politiska framferðin

- Landbúnaðarpolitikkurin sendur til hoyringar hjá pørtum og almenningi
- Lagdur fyri allar flokkar
- Lógaruppskotini løgd fyri tingið í stigum – eins og fíggingin





# Nú skal vára í føroyskum landbúnaðarpolitikki…